

## Undirgraving

Eingin ivi er um, at tað er einfalt at keypa ódýrar vørur úr útlandinum heim til Føroyar. Fyri tað dagliga húsarhaldið kann hetta kennast sum ein fyrimunur í fyrsta umfari.

Marjus Dam sær her ein vanda í, at so nógv verður innflutt úr útlandinum, og sum annars kundi verið keypt í Føroyum. Fyri hann merkir hetta nærum tað sama, sum at ein sagar greinina, ið ein sjálvur situr á, við tað at ein soleiðis undirgravar føroyskt vinnulív.

– Ja, hygg. Um eg nú skuldi keypt míni vindeygu úr útlandinum, so stuðli eg automatiskt útlendskum arbeiðsplássum. Og so merkir tað hinvegin aftur, at eg eri við til at útflyta føroysk arbeiðspláss.

– Eitt arbeiði sum kundi verið gjørt her á landi, verður soleiðis latið øðrum at gera. Nei, tað rættasta hevði sjálvandi verið, at vit stóðu saman og stuðlaðu okkara egnu fyritøkum, vísir hann á.

Eitt dømi um hetta er, eftir hansara meting, júst HDYGD, sum hevur ment eitt føroyskt vindeyga sum hóskar sera væl til tað føroyska veðurlagið.

– Og so kann tað bæði storma og ýla harúti, men teirra vindeygu eru av besta slag. Eg havi so ongatíð havt trupulleikar av gjóstri ella vætu.

**TØTT**

*– Eg havi verið sera væl nøgdur við vindeyguni hjá HDYGD. Tey virka væl, eru tøtt, og halda bæði vindi og vætu úti. Eg skal so ikki klaga, sigur Marjus Dam í Miðvági*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

fimm árum. So tú kanst ætla, at hesi fólkini, tey vóru í øllum førum sannførd um, at tey fóru bara at keypa føroysk vindeygu hereftir, vísir hann á. – So fyri tey var tað ein sera dýrur umgangur at keypa útlendskt.

### Katten i sækken

Sum løgtingsmaður fyri sambandsflokkin í Vágum hevur Marjus sjálvandi áhuga fyri, at vinnulívið í oynni hevur tað gott og kann menna seg. Og, sum hann tekur til:

– Tað eru helst mong sum høvdu undrað seg, um eg fór av oynni fyri at keypa vindeygu til míni hús í Miðvági.

Í hansara føri var tað kortini ikki neyðugt at fara so øgiliga langt.

**» Um eg nú skuldi keypt míni vindeygu úr útlandinum, so stuðli eg automatiskt útlendskum arbeiðsplássum. Og so merkir tað hinvegin aftur, at eg eri við til at útflyta føroysk arbeiðspláss**

Hann hevði jú frammanundan keypt vindeygu úr Vatnsoyrum, og visti tí, hvat hann fekk og fór at fáa, um hann aftur valdi eina loysn frá HDYGD.

– Nei, tað hevur sín fyrimun at keypa føroyskt framleidd vindeygu, tí annars er altíð ein vandi fyri, at ein keypir "katten i sækken", sum hann málber seg.

– Eru so nakrir trupulleikar, so veitst tú hvønn tú skalt venda tær til. Tá kanst tú tosa við ein føroying, heldur enn ein útlending sum tú als ikki kennir.

– Men tað eri eg so sloppin undan higartil, sigur Marjus við einum brosi.

### Í øllum veðri

Eftir at Marjus hevði spurt seg fyri og hevði kannað tey ymisku vindeyguni, varð avgerð tikin um at keypa vindeygu frá virkinum í grannabygdini, Vatnsoyrar.

Ikki nóg mikið við tað. Marjus ynskti eisini, at fáa menn frá virkinum at seta vindeyguni í fyri hann. Og hetta lat seg eisini gera.

Tað var kortini ein forðing á vegnum, og tað var árstíðin, tá vindeyguni skuldu setast í, nevniliga mars mánaður, tá veðrið kann vera rættiliga skiftandi og sum oftast ringt.

– Og tað var eisini ringt, skal eg siga tær. Eg trúði heilt erliga ikki, at tað fór at bera til hjá teimum báðum monnunum at seta vindeyguni í.

– Men eg fekk annað at síggja, sigur Marjus.

Hann sá beinanvegin, at hetta vóru menn sum vóru vanir við slíkt arbeiði, óansæð hvussu veðurvánirnar vóru. Teir fingu arbeitt soleiðis, at eftir fáum døgum vóru øll vindeyguni skift.

– Eg haldi, at teir dugdu avbera væl at laga arbeiðið eftir veðrinum og ættini. Jú, teir dugdu sítt arbeiði.

snorri@sosialurin.fo